


# Heyst

Ein vika verður brúkt til evnið.

## Bordi, bls. 12

| | |
|---|---|
| Árshjól: | Hvussu eitur mánaðurin, og hvør er árstíðin? |
| Leyv av trøum: | Hvat hendir við bløðunum hesa árstíðina? Hvat hendir við grasi og blómum? Hvat hendir við fuglunum? |
| Epli: | Prátið um at taka upp epli? Nær verða eplini sett niður? Nær verða tey tikin upp? |
| Seyðahorn: | Prátið stutt um fjallgongu. |

## Opna, bls. 12-13

Í bókini verður arbeitt við øllum fýra árstíðunum, heysti, vetri, vári og summari. Allar opnurnar hava eina bakgrund, sum ímynda árstíðina, ið arbeitt verður við. Nógvar smáar myndir av heystinum eru á opnuni, umframt eina mynd av hvørjari av hinum trimum árstíðunum. Opnan leggur tískil upp til at prátað verður um heystið, samstundis sum komið verður inn á hinar árstíðirnar.

Flokksprát er um opnuna:

- hvussu sær bakgrundin út? – Hvat er á, og hvørjir litir eru?
- hvør man árstíðin vera? Hesin spurningur leggur kanska upp til kjak í flokkinum.
- hvørjar myndir hoyra til heystið? (berini, følnaða blaðið, eplið, brimið, fjallgongan, flettingin, kópurin)
- hví er veltan ikki ein heystmynd? (hon er nývelt, eingir slokkar – árstíðin er vár)
- hvat merkir orðið “heyst”, og hvat heysta vit í Føroyum um heystið?
- hvussu er veðrið um heystið?
- hvussu eru litirnir í náttúruni?
- hvat er serligt við heystinum? (myrkari, kaldari, fjallgonga, fletting, taka upp epli, fuglarnir flyta…)
- hvat kenna tit til fjallgongu og fletting? – Hava tit verið við til at flett?

• hvør heystmynd kundi verið afturat á opnuni?
• hvat spæla børn serliga um heystið?
• hvat gera tey vaksnu?
• hvussu er við longdini á degi og nátt?
• hvørjar frítíðir eru um heystið?
• hvør ítróttur er um heystið? – Byrjar nøkur ítróttagrein, og endar onkur?
• hvørji frítíðarítriv fáast næmingarnir í flokkinum við um heystið?

Flokkurin prátar um tær myndirnar, ið ikki hoyra til heystið:
• hvør mynd hoyrir til veturin, og hvørjum er hon av? (børn spæla í kavanum).
• hvør mynd hoyrir til summarið? (blóman). Kenna tit blómuna?
• veltan hoyrir til várið? Hvussu sæst, at veltan er nývelt?

Næmingarnir fara í bólkar við 3-4 næmingum í hvørjum. Í bólkinum skulu næmingarnir skiftast um at greiða frá, hvat teimum dámar við heystinum, og hvat teimum ikki dámar.
Lærarin setur prátið í gongd við eini klokku ella floytu og steðgar tí somuleiðis prátinum á sama hátt. Hvør næmingur fær uml. 1 min. at greiða frá.
Allir bólkarnir eru lidnir samstundis.

Fløga: Árið.

## Arbeiðsbók, bls. 18-19

Á bls.18 skulu næmingarnir lita tann partin av myndini, ið teir halda hóskar til heystið. Onkur partur av myndini kann hóska til heystið og aðrar árstíðir. Tað er í lagi, at hesin parturin eisni verður litaður.
Á bls.19 skulu næmingarnir gera eina heystmynd. Teir klippa úr bløðum og líma síðuna. Næmingarnir kunnu eisini tekna og lita, um teir heldur vilja tað.

## Aktivitetir

Samla ymisk bløð, sum eru dottin av trøum.

Lit-prent:

Tú skalt brúka:
✓ hvítt pappír
✓ følnað bløð
✓ litir
✓ pensil

Mannagongd:
✓ mála blaðið
✓ legg blaðið á eitt pappír við litinum niðureftir
✓ rulla eftir blaðnum við køkurullu

Gerið eitt træ – vælegnað sum bólkauppgáva

Tú skalt brúka:
✓ karton
✓ litblýantar
✓ lím
✓ heil bløð sum eru ymisk og í ymiskum litum

Mannagongd:
✓ tekna og lita eina træbul á eitt hvítt karton
✓ líma bløðini á træið

Taka upp epli:

Flokkurin fer á vitjan hjá einum bónda ella onkrum, ið hevur sett niður epli.
Tey hjálpa til at taka upp.
Eitt annað ár kann flokkurin sjálvur gera sær eina lítla veltu, sum hann so tekur upp aftur um heystið.

Í sambandi við, at børnini siga, hvat annað kundi verið á heystmyndini, ber eisini til at lata flokkin arbeiða við at gera eina heystkollasju. Tey eru í árstíðini, so til ber at fara út í náttúruna at taka myndir, printa tær út og gera eina kollasju.

## Fakta

Heystið í Føroyum er í september, oktober og november. Tá heystið kemur, broytist veðrið. Tað gerst myrkari og kaldari enn um summarið. Sólin rísir seinni og setur fyrr enn um summarið.
Meðan dagur og nátt næstan vóru sum eitt um summarið, so styttast dagarnir, og næturnar leingjast, tess longri vit koma út á heystið.
23. september hava vit heystjavndøgur. Tá eru dagur og nátt eins long, 12 tímar.
Aftan á heystjavndøgur styttast dagarnir, til aftur fer at ganga hin vegin 21. desember.
Um heystið fyrireikar alt livandi seg uppá at klára veturin, sum stendur fyri framman.
Nógvir av fuglunum, sum hava verið her um summarið, flúgva burtur í heitari lond og koma ikki aftur, fyrr enn tað fer at vára.
Bløðini detta av leyvtrøunum, og summar plantur seta fræ, áðrenn tær doyggja, meðan aðrar plantur følna. Talan er tó bert um tann parturin av plantuni, sum er oman á jørðini.
Tey seinastu eplini verða tikin upp.

## Keldur

Efterår, Gabrielle Woolfitt
Hurra det er efterår, Jørn Jensen
Lív og gróður, Jenny Lydersen
Ferðafuglar, Dorete Bloch og Søren Sørensen
Fuglar í Norðurhøvum, Søren Sørensen og Dorete Bloch




# Seyður

Ein vika verður brúkt til evnið.

## Bordi, bls. 14

Árshjól: Hvussu eitur mánaðurin, og hvør er árstíðin?
Klokka: Summartíðin endar síðst í oktober. Prátið um at flyta klokkuna. Verður klokkan so minni ella meira, tá hon verður flutt til vetrartíð?
Krov: Prátið stutt um fjallgongu og fletting

## Opna, bls. 14-15

Næmingarnir práta í bólki frítt um opnuna. Opnan vísir seyð við ymsari útsjónd og í ymsum støðum. Næmingarnir velja sjálvir, hvat teir hava hug at práta um á myndini. Kanska fara teir í dýpdina við onkrum, meðan okkurt annað verður umlopið.
Bólkaprátið varir í umleið 10 minuttir.

Aftan á bólkaprátið verður flokksprát um opnuna
Prátað verður fyrst um vinstru síðu:

- hvussu vorðin er seyðurin á myndini? (hann er ymiskur á liti: hvítur, svartur og morreyður).
- hvussu eitur kvenndjórið, kalldjórið og avkom teirra? (ær, veðrur, lamb).
- hvat eyðkennir veðrarnar?
- hvussu kallast ær við tveimum lombum? (tvílemba, summastaðni framborið tvølba).

Bakgrundin fyri allar myndirnar er ein seyður. Oyrað er ein partur av ovasta raði.
Prátið um, at seyður verður markaður í oyrað:

- hví verður seyðurin markaður? (fyri at vita, hvør ið eigur hann).
- hvussu síggja markini á myndunum mitt niður eftir síðuni út?
- ber til at kenna seyð at á annan hátt? (her kunnu næmingarnir koma við øllum hugsandi uppskotum).

• hvat ger maðurin á ovastu mynd til høgru? (røktingarmaður)
• hvat gera røktingarmenn?

Á myndunum uttast til høgru sæst fjallgonga og seyður í rætt. Prátið um at fara á fjall:
Nær fara fólk á fjall?
• hvat verður gjørt við seyðin um summarið? (klipping, heilivágur, marking).
• hvat verður gjørt við seyðin um heystið? (seyðurin, sum skal drepast, verður tikin frá, og seyðurin, ið skal sleppast, verður valdur út).
• hava tit verið á fjall? (næmingar, ið hava verið á fjall, sleppa at siga frá)

Flokkurin prátar um høgru síðu:
• hvat ger konan á myndini?
• hvat fæst burtur úr seyði? Prátið um tað, sum er til vinstru á síðuni (krov, tjógv, seyðarhøvd, blóðpylsa og rullupylsa)
• fæst annað burtur úr seyði, enn tað sum er á myndunum?
• prátið um seyðin ovast til høgru. Hvussu sær hann út?
• hvør fær mein av ullini, ið sløðist runt í haganum?
Prátið um myndina niðast til høgru:
• hvat gera menninir?
• hvat gera genturnar?

Mittasta myndin til høgru vísir karðar, rokk og tógv. Prátið um ull og tað, ið fæst úr ullini:
• hvat gera vit við ullina í dag?
• gamal orðatak sigur: "Ull er Føroya gull". Hvat merkir tað? Er tað enn soleiðis?
• hvat fæst burtur úr ullini?

## Arbeiðsbók, bls. 20-21

Uppgávan á bls. 20 er ein floksuppgáva. Av tí at ikki kann verða roknað við, at næmingarnir sjálvir duga at lesa so tíðliga í 1. flokki, so er uppgávan gjørd sum felagsuppgáva. Lærarin lesur upp fyrsta orðið soleiðis: eitt: lamb. Næmingarnir finna røttu myndina og skriva eitt 1-tal á regluna. Lærarin fer víðari, tá allir næmingarnir eru klárir.
Næmingar, ið duga at lesa, kunnu sjálvandi sjálvir loysa uppgávuna.
Í uppgávuni á bls. 21 skulu næmingarnir seta ring um tað, sum vit fáa frá seyði. Flokkurin hevur tosað saman um seyð: fjallgongu, fletting, hvat fæst burtur úr seyði o.s. fr., so næmingarnir eiga at duga at arbeiða við hesi uppgávu sjálvstøðugt.

## Aktivitetir

Næmingarnir vitja á eini rætt, tá fólk hava verið á fjalli.

Kann gerast á einum bóndagarði ella í skúlanum:

Ein seyður verður flettur, meðan næmingarnir hyggja at. Tosað verður um seyðin, meðan hann verður flettur, t.d. ull, høvd, horn, veðurlamb/gimburlamb, innvøl og blóð.

## Søgur

Mæið, Steinbjørn B. Jacobsen, Forlagið Stemplið
Heimalambið, Sigurd Joensen, Ungu Føroyar
Smálombini, Sigurd Joensen

## Fakta

Í Føroyum eru uml. 70.000 áseyðir. Harafturat koma veðrar og lomb.
Um summarið verður farið á fjall. Seyður kastar ullina eina ferð um árið, so fjallið má verða gingið, áðrenn hann kastar ullina. Seyðurin verður rikin í rætt, har hann fær heilivág, verður royttur/kliptur og vaskaður fyri lús. Lombini, sum enn ikki eru markað, verða markað.
Um heystið verður eisini farið á fjall, og seyðurin verður rikin í rætt. Tann seyðurin, ið skal drepast verður tikin frá, meðan lomb, sum skulu sleppast, verða vald út. Somuleiðis verða teir veðrarnir útvaldir, sum skulu nýtast til brund.
Seyðaslagið í Føroyum er tað sama um alt landið. Summastaðni er seyðurin størri enn aðrastaðni. Har seyðurin er minni, kann vera tí, at ov nógvur seyður er – skipanin er ov stór, og tí verður ov lítið at eta.
Ærnar lemba í apríl-mai, og tá ræður um, at tær eru væl fyri. Ærin gongur kviðin í 142 dagar. Summar ær lemba eitt lamb, aðrar eru tvílembur. Onkuntíð lembir ærin trý lomb. Lombini viga nýlembd 3-4 kg.

Vanliga eru veðurlomb og veðrar hornut og gimburlomb og ær kollut. Ofta vaksa hornini á veðrum inn í kjálkan. Tá fáa teir illa etið. Hol verður tí borað í stiklini og klemma sett í. Klemman spennir hornini útfrá, so tey ikki pína seyðin. Eisini verður sagað undan hornunum.
Upprunaligi seyðurin í Føroyum var smáur. Teir seinastu seyðirnir vórðu tiknir av Lítlu Dímun í 1866. Seyðurin nú líkist nógv íslendskum og norskum seyði. Seinni eru komin ymisk skotsk sløg afturat.

## Keldur

Áin, heimstaðarlæra til 2. skúlaár, Turið M. Sørensen
Náttúrusøga, Dýr og plantur, Theodor Hansen